# formuladeildin

| | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 HB | 12 | 8 - 1 - 3 | 32 | 14 | 18 | 25 |
| 2 B36 | 11 | 6 - 4 - 1 | 16 | 5 | 11 | 22 |
| 3 Skála | 12 | 5 - 5 - 2 | 23 | 15 | 8 | 20 |
| 4 NSÍ | 12 | 5 - 4 - 3 | 18 | 14 | 4 | 19 |
| 5 EB/Streymur | 12 | 4 - 4 - 4 | 12 | 19 | -7 | 16 |
| 6 KÍ | 12 | 4 - 2 - 6 | 20 | 17 | 3 | 14 |
| 7 GÍ | 12 | 4 - 1 - 7 | 17 | 21 | -4 | 13 |
| 8 ÍF | 12 | 3 - 4 - 5 | 14 | 26 | -12 | 13 |
| 9 TB | 12 | 3 - 3 - 6 | 12 | 20 | -8 | 12 |
| 10 VB | 11 | 2 - 2 - 7 | 6 | 19 | -13 | 8 |

| 2. deild menn | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 B71 | 6 | 5 - 0 - 1 | 16 | 5 | 11 | 15 |
| 2 B68 | 6 | 5 - 0 - 1 | 25 | 3 | 22 | 15 |
| 3 FSV04 | 6 | 5 - 0 - 1 | 19 | 3 | 16 | 15 |
| 4 AB | 6 | 3 - 1 - 2 | 12 | 13 | -1 | 10 |
| 5 LÍF | 6 | 3 - 0 - 3 | 26 | 15 | 11 | 9 |
| 6 HB | 6 | 3 - 0 - 3 | 15 | 14 | 1 | 9 |
| 7 Royn | 6 | 3 - 0 - 3 | 9 | 23 | -14 | 9 |
| 8 Sumba | 6 | 1 - 0 - 5 | 15 | 30 | -15 | 3 |
| 9 B36 | 6 | 0 - 2 - 4 | 6 | 13 | -7 | 2 |
| 10 GÍ | 6 | 0 - 1 - 5 | 6 | 30 | -24 | 1 |

adidas

## Máltindarnir

**Formula-deildin**

| | | |
|---|---|---|
| Súni Olsen | GÍ | 9 |
| Allan Mørkøre | B36 | 6 |
| Rúni Nolsøe | HB | 6 |
| Tór-Ingar Akselsen | HB | 6 |
| Heðin á Lakjuni | KÍ | 6 |
| Jónhard Frederiksberg | Skála | 6 |
| Hans á Lag | HB | 5 |
| Christian Høgni Jacobsen | NSÍ | 5 |
| Bogi Gregersen | Skála | 5 |
| Óli Johannesen | TB | 5 |
| Hans Pauli Samuelsen | EB/S | 4 |
| Rasmus Nolsøe | HB | 4 |
| Atli Danielsen | KÍ | 4 |
| Andy Olsen | NSÍ | 4 |
| Hanus Thorleifsson | Skála | 4 |

**2. deild**

| | | |
|---|---|---|
| Súni Fríði Barbá | AB | 8 |
| Jóhan Petur Poulsen | B68 | 8 |
| Clayton Soares | B71 | 8 |
| Sonny Johansen | FSV04 | 7 |
| Ovi Magnussen | B68 | 5 |
| Hendrik Rubeksen | HB | 5 |
| Magnus Skorðalíð | LÍF | 5 |
| Tummas Hans Rubeksen | B36 | 4 |
| Øssur Jacobsen | B68 | 4 |
| Uni Arge | HB | 4 |
| Fróði Joensen | LÍF | 4 |
| Jóan Pauli Olsen | Sumba | 4 |
| Rene Thomsen | Sumba | 4 |

## VB-B36 útsettur

Fimti dysturin, ið skuldi verið leiktur í Formula-deildini um vikuskiftið, varð av ongum.

Hesin skuldi annars verið í Vági millum VB og B36, men líkindini til fótbólt vóru alt annað enn góð á Eiðinum í Vági.

- Eg metti tað ikki vera rætt, at tað skuldi verða tilvildin, sum skuldi ráða, og tað hevði tað verið, um tað varð spælt í dag, segði Petur Reinert, sum skuldi vera dómari í Vági.

Sum dagurin leið, batnaði veðrið nakað, og møguleikin fyri at spæla dystin mánakvøldið, varð eisini umrøddur. Men hetta bleiv kortini av ongum. Hjá B36 vóru fleiri spælarar, sum høvdu onnur ørindi enn fótbólt at avgreiða mánadagin, og helst av øllum vilja teir, at dysturin verður spældu okkurt vikuskiftið, tá hetta ber til. Tann møguleikin verður so í løtuni troyttur av FSF, men spurningurin er, um tað ber til at finna eitt slíkt vikuskift, nú kappingin er vorðin somikið komprimerað.

-jm



*Clayton Soares skoraði einsamalla málið, tá tað eydnaðist B71 at vinna útidystin á Svangaskarði*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# B68 av tindinum

**Við einum hart vunnum sigri á Svangaskarði hevur B71 nú lagt seg á odda í 2. deild**

2. DEILD

*Jákup Mørk*

Higartil hevur tosið um kappingina í aðru deild mest snúð seg um, hvør skuldi fara at fylgja toftamonnum. Onkur tykist enntá hava tosað um, at einasti spurningurin fór at verða, hvørt B68 fór at gera GÍ kynstið eftir. Tá gøtumenn á sinni vunnu aðru deild, varð hetta nevnliga gjørt við fullum stigatali, og manningin hjá B68 hevur í ár tókst somikið sterk, at hetta kanska ikki var púrasta ørt at hugsa.

Men tann dreymin kunnu toftamenn í øllum førum gloyma alt um. Leygardagin máttu teir nevnliga leggja rygg til 1-0 tap í toppdystinum móti B71, sum harvið hevur lagt seg á odda við hjálp frá regluni um innanhýsis úrslit.

Talan var ikki um tann best spælda dystin á árinum, tá B71 vitjaði. Fyri steðgin var kanska ikki so nógvur munur á, men Clayton Soares megnaði tó at seta hol á, tá hann slapp leysur í vinstru. Hann rak inn um málverjan, sum var komin út, og tá hann so skeyt úr spískum, smoygdi bólturi sær inn, hóast Arnbjørn Danielsen tókist hava møguleikan at rudda.

Og so kundu gestirnir leggja dentin á kontra- og verjuspælið. Fortreytirnar fyri hesum batnaðu eisini, tá Øssur Jacobsen varð rikin av vøllinum stutt eftir steðgin, men kortini hendi tað, at B68 nú tók fullkomuliga yvir. Álopini snøgt sagt skolaðu oman yvir B71 málið, har bert 18 ára gamli Símun Røgvi Hansen hevði nokk at síggja til. Men nærri enn skoti á stongina komu toftamenn ikki, og so kundu gestirnir fegnir fara suður aftur við øllum stigunum.

### Hat-trick í 12 minuttir

Vágamenn eru framvegis teir, sum fylgja við hinum báðum oddaliðunum, og teir vunnu aftur trygt hetta vikuskiftið.

Hesa ferð var tað Sumba, sum vitjaði, og við einum 6-1 sigri læt FSV ikki nakran sum helst iva vera um, hvar stigini skuldu fara. Merkisvert var hesaferð, at ikki færri enn fimm málskjúttar komu á talvuna fyri FSV, har tað higartil einamest hava verið Sonni Johansen og Birgir Joensen, sum hava gjørt um seg.

Á Argjum kundi AB takka Súna Fríða Barbá fyri, at teir fingu stigini, sum fluttu liðáið upp á fjórða plássið. LÍF hevði annars lagt seg á odda 2-0 stutt inn í annan hálvleik, men so tók gamli málrevurin í fatt. Seinastu 12 minuttirnar skoraði hann tríggjar ferðir, og so kundu leirvíkingarnir ikki annað enn iðra seg um tað, sum kundi verið.

Í Havn hevði B36 hesa ferð heimavøll móti HB, men heldur ikki hesaferð eydnaðist teimum hvítu at fáa fulla úrtøku. Heine Fernandez er nú aftur um at koma fyri seg hjá HB, og legði eisini teir reyð/svørtu á odda fyri steðgin. Levi Hanssen javnaði fyri B36, men ein annar ungur maður, Hendrik Rubeksen, syrgdi fyri, at HB fekk øll stigini.

Og loksins fekk GÍ heldur ikki nakað burtur úr sínum dysti. Royn hevur havt tað tungt í ár, eftir at teir annars vunnu tey bæði fyrstu umførini, men hesa ferð var tó eingin ivi. 5-0 varð úrslitið, sum altso helt GÍ fast í botninum av deildini.

### Úrslitini

B68-B71 0-1 (0-1)
0-1: Clayton Soares

**FSV2004-Sumba 6-1 (3-0)**
0-1: Elfinn Ørvarodd
2-0: Jákup G. Joensen
3-0: Sjúrður Ellefsen
4-0: Elfinn Ørvarodd
5-0: Sonni Johansen
6-0: Per Joensen
6-1: Dánjal Jacob Joensen

**AB-LÍF 3-2 (0-1)**
0-1: Andrias á Lava Olsen
0-2: Petur Sjúrðarberg
1-2: Súni Fríði Barbá
2-2: Súni Fríði Barbá
3-2: Súni Fríði Barbá

**Royn-GÍ 5-0 (3-0)**
1-0: Kristian Bertholdsen
2-0: Kaj Roest
3-0: Hanus Toftheyggj
4-0: Gisli Sveinbjørnsson
5-0: Frits Eið

**B36-HB 1-2 (0-1)**
0-1: Heine Fernandez
1-1: Levi Hanssen
1-2: Hendrik Rubeksen